**Ítróttasamband Føroya**
The Faroese Confederation of Sports and Olympic Committee

*Verji: Føroya Løgmaður*
*Protector: The Faroese*
*Prime Minister*

# Reglugerð fyri stuðul til altjóða kappingar í Føroyum

Hendan reglugerð viðgerð treytir fyri at fáa peningaligan stuðul til at skipa fyri altjóða kappingum í Føroyum.

Stuðul kann søkjast til altjóða kappingar, sum ser- og menningarsambond skipa fyri í Føroyum. Sum meginregla skulu hesar treytir verða uppfyltar.

1. Talan skal verða um altjóða kapping, sum er fyriskipað og góðkend av altjóða sambandi
2. Kappingin skal vera á NM-støði ella á líknandi ella hægri støði.
3. Kappingin kann vera fyri junior ella vaksin.
4. Í minsta lagi 4 lond skulu luttaka í kappingini.
5. Í mun til uppsetta fíggjarætlan kann ein undirskotstrygd setast.
6. Umsóknarfreistin er 15. november árið fyri
7. Uppgerð við skjalprógvum fyri útreiðslurnar skal innlatast ÍSF seinast tveir mánaðir eftir, at kappingin hevur verið.

*Samtykt á starvsnevndarfundi 4. desember 2017, og seinast tillagað á starvsnevndarfundi 27. oktober 2025*